## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Fyrrapartin fleyr til gul av ynsum ættum, turt og sólglottar. Seinnapartin gul til stívt andøvsgul av landsynningi og møguliga regn eitt skifti. Hitin millum 6 og 9 stig.




**Veðrið hósdagin – Kristi Himmalsferðardag:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av landsynningi og stundum regn. Seint um kvøldið upp í skrið av útsynningi og ælingur. Hitin millum 8 og 11 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi, um kvøldið hækkar hann upp í útnyrðing. Ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 5 og 8 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útnyrðingi, sunnukvøldið lækkar hann niður í útsynning. Leygardagin ælingur, men sunnudagin yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 3 og 7 stig.

# Hálvtannaðhundrað hittust í Tjørnuvík

**Eftirkomararnir eftir Sannu og Hans Dávid Davidsen í Elduvík, savnaðust allir í Tjørnuvík leygardagin. Talan var um hálvthundrað fólk, sum hittust til gongutúr, kaffi, kingosang og bygdarsøgu**



*Tilsamans 147 fólk savnaðust í Tjørnuvík, har eftirkomararnir eftir Sannu og Hans Dávid Davidsen savnaðust leygardagin*
*Mynd: Høgni Thomsen*

FAMILJUSTEVNA
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Fólkatalið í Tjørnuvík fleirfaldaðist leygardagin, tá eftirkomararnir eftir Sannu og Hans Dávid Davidsen í Liðanum í Elduvík savnaðust í bygdini.

Bygdarhúsið var staðið, har tey tilsamans 147 fólkini savnaðust. Nógv komu við bili til bygdina, men tey vóru eisini fleiri, sum gingu fyriskipaða túrurin frá Saksun til Tjørnuvíkar, ið tók tríggjar tímar.

Í Tjørnuvík fyltu tey kirkjuna, har bygdarfólk framførdu kingosang. Í bygdarhúsinum varð greitt frá bygdarsøguni, og annars spákaðu tey vaksnu sær í bygdini, meðan børnini í góðveðrinum spældu sær á sandinum.

Síðani var góður føroyskur náttúrði á skránni, og dagurin endaði við, at videoupptøkur frá 1989, tá familjan savnaðist í Kalsoynni, vóru vístar fram. Talan var um ein sera væleydnaðan dag, har tað eisini eydnaðist at fáa fólkini savnaði til eina felagsmynd uttanfyri bygdarhúsið í Tjørnuvík, áðrenn farið var heimaftur um kvøldið.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 5 |
| Nuuk | 5 |
| Qaqortoq | -- |
| Ammassalik | 4 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 5 |
| Seyðisfjørður | 3 |
| Tórshavn | 7 |
| Lerwick | 5 |
| Aberdeen | 8 |
| London | 15 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 8 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 9 |
| Keypmannah. | 11 |
| Helsinki | 12 |
| Moskva | 15 |
| Berlin | 10 |
| Warzawa | 15 |
| Kiev | 18 |
| Bukarest | 26 |
| Paris | 18 |
| Madrid | 22 |
| Róm | 23 |
| Malorca | 22 |
| Athen | 26 |
| Malta | 27 |
| Tunis | 32 |
| Beijing | 32 |
| New Dehli | 34 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 23 |
| New York | 21 |
| Miami | 27 |
| Los Angeles | 16 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 29 |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 13 |

### LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt veikt hátrýst, 1013 hPa. vestan fyri Føroyar viknar.




**Í dag:**
Eitt lágtrýst, 992 hPa. í landsynning úr Hvarvinum fer spakuliga í landnyrðing og dýpist. Brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum hósdagin.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 12/5 kl. $06^{00}$ – 13/5. $06^{00}$. Hitin í gjár: 4,5°
Minsti hiti máldur í mai: -3,0° - Mesti hiti máldur í mai: 19,7°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 3,0 mm – mált frá 9/5 kl. $06^{00}$– 10/5 kl. $06^{00}$
Avfallið higartil í mai: 27,0 mm




## VESTFALLSKYRRINDI

24. apríl Fyrra kvarter
30. apríl Mánin longst frá jørðini
2. mai Fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2007

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 15. Mai | 05.43 | 18.07 | 04.43 | 17.07 | 04.58 | 17.22 | 07.43 | 20.07 | 08.43 | 21.07 | 03.58 | 16.22 | 02.58 | 15.22 | 05.58 | 18.22 | 06.58 | 19.22 | 05.28 | 17.52 | 06.43 | 19.07 |
| 16. Mai | 06.34 | 19.02 | 05.34 | 18.02 | 05.49 | 18.17 | 08.34 | 21.02 | 09.34 | 22.02 | 04.49 | 17.17 | 03.49 | 16.17 | 06.49 | 19.17 | 07.49 | 20.17 | 06.19 | 18.47 | 07.34 | 20.02 |
| 17. Mai | 07.32 | 20.03 | 06.32 | 19.03 | 06.47 | 19.18 | 09.32 | 22.03 | 10.32 | 23.03 | 05.47 | 18.18 | 04.47 | 17.18 | 07.47 | 20.18 | 08.47 | 21.18 | 07.17 | 19.48 | 08.32 | 21.03 |
| 18. Mai | 08.34 | 21.05 | 07.34 | 20.05 | 07.49 | 20.20 | 10.34 | 23.05 | 11.34 | - | 06.49 | 19.20 | 05.49 | 18.20 | 08.49 | 21.20 | 09.49 | 22.20 | 08.19 | 20.50 | 09.34 | 22.05 |
| 19. Mai | 09.35 | 22.06 | 08.35 | 21.06 | 08.50 | 21.21 | 11.35 | - | 00.05 | 12.35 | 07.50 | 20.21 | 06.50 | 19.21 | 09.50 | 22.21 | 10.50 | 23.21 | 09.20 | 21.51 | 10.35 | 23.06 |